hylgiskjal 5

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
FO-110 Tórshavn

Att.:

Tórshavn 5. februar 2019

Okkara tilv./Our ref.:
3391-584/Esther/Uttanr-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar viðv. broyting í útlendingalógini

Víst verður til hoyringsskriv tykkara um uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om udlændingeloven, sum varð sent okkum 22. januar í ár.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ger vart við, at talan er um eitt lutfalsliga tungt umsitingarøkið, og tað hevur týdning fyri atgongdina til arbeiðsmegi hjá føroysku vinnuni, at hetta virkar væl og skjótt.

Tí er tað grundleggjandi fyri hesar broytingar, sum verða skotnar upp, at neyðuga umsitingarliga orkan og neyðugu umsitingarligu førleikarnir eru til staðar, áðrenn broytingarnar verða framdar í verki.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Marita Rasmussen